## Vænta nógv arbeiði

Heimsins størsta aluminiumsfyritøkan, Alcoa, hevur júst verið í Grønlandi og kunnað fólk har um ætlanina hjá fyritøkuni at byggja eitt stórt aluminiumsvirki í Grønlandi. Enn er ógreitt, hvar tað verður. Á ferðini kom fram, at ætlandi verða millum 700 og 800 arbeiðspláss á virkinum, og nógv tey flestu fáa grønlendingar. Alcoa vísti í hesum sambandi á, at felagið leggur seg altíð eftir at brúka lokala arbeiðsmegi til síni virkir kring heimin.

# yvirlækna



*Umstøðurnar á Hotel Tórshavn í Keypmannahavn hava í seinastuni verið undir hørðum atfinningum. Nú svarar leiðarin á sjúklingahotellinum aftur til hørðu atfinningarnar*
*Mynd: Kári Mikkelsen*

er tann, at tað er føroyska sjúkrahúsverkið, ið keypir veitingarnar frá Ríkissjúkrahúsinum. Tí eigur føroyska skipanin at seta øll neyðug krøv og eisini vísa ábyrgd fyri, at sjúklingagongdirnar eru fakliga og fíggjarliga so góðar, sum til ber. Tað er hent meira enn ta einu ferðina, at sjúklingar, ið Jákup Petersen hevur sent á Ríkissjúkrahúsið eru sendir heimaftur óviðgjørdir, tí Jákup Petersen hevur skipað alt ov illa fyri«, er svarið frá Onnu Mariu Durhuus til føroyska yvirlæknan.

### Ynskir betri samskifti

Leiðarin á sjúklingahotellinum vísir á, at Hotel Torshavn hevur eitt frálíkt samstarv við Ríkissjúkrahúsið um hvønn einstakan sjúkling. Harumframt er sjúklingavegleiðari har, sum kann fylgja við støðuni hjá hvørjum einstøkum sjúklingi.

»Vit eru harafturat alsamt í sambandi við ymsu deplarnar á Ríkissjúkrahúsinum til tess at bøta um samstarvið og mannagongdirnar fyri føroysku sjuklingadvølini. Øll á Hotel Torshavn leggja stóra orku í at stuðla og vegleiða teir sjúklingar, ið verða sendir til Keypmannahavnar. Eg vísi staðiliga aftur teimum uppáhaldum, sum Jákup Petersen er komin við. Fyri at siga tað bart út, átti tað at verið undir hansara tign at úttala seg um nakað, hann ikki hevur fortreytir at vita nakað um. Ei heldur sømir tað seg manni í hansara støðu at ríða so lágt, sum hann ger.«

Leiðarin á sjúklingahotellinum endar sína viðmerking við hesi áheitan:

»Latið okkum fáa góðan og uppbyggjandi dialog um alt tað, sum kann bøta um umstøðurnar hjá føroyskum sjúklingum í Keypmannahavn. Tað hevði sømt seg betur, og tað hevði sanniliga sømt seg einum yvirlækna betur at farið undir hetta stórmál á tignarligan hátt.«

# Fastnethaldararnir minka

**Hagtøl frá Fjarskiftiseftirlitinum vísa, at talið á fastnettelefonum er minkað seinastu árini.**

TELEFONI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Frá fyrra hálvári 2003 og fram til endan á 2006 minkaði talið á vanligum telefoni fastnethaldarum úr 21.764 niður í 21.030.

Eisini ISDN-2 haldarar minkaðu í stórum tali hetta tíðarskeiðið, úr 2499 pr. 1. Januar 2003 niður í 1972 31. Desember 2006. ISDN 30-haldarar kvinkaðu eitt vet uppeftir, men tølini har eru so lítil, at tey ongan mun gera í samlaða talinum av haldarum.

Í alt minkaði talið av fastnethaldarum úr 24.292 fyrsta hálvár 2003 niður í 23.043 seinna hálvár 2006, vísa hagtøl hjá Fjarskiftiseftirlitinnum.

Býtið av marknaðarpartinum hjá føroysku telefonútbjóðarunum liggur rímiliga støðugt. Føroya Tele hevur áleið 80% av marknaðinum, Kall um 20%.

Men er talið av fastnethaldarum minkandi, so er talið av teimum, ið fáa sær breiðband vaksandi. Frá 1. Januar 2005 til 31. Desember 2006 vaks breiðbandshaldið úr 4002 heilt upp í 10.099. Eisini her er Føroya Tele fremst við áleið 70%, Kall (nú Eitt) við góðum 20%, meðan Teletech hevur 5% og aðrir útbjóðarar áleið onnur 5%.

### Fartelefoni veksur

Eisini talið av fartelefonihaldum er støðugt vaksandi. Frá fyrra hálvári 2005 til seinna hálvár 2006 vaks talið av fartelefonhaldarum úr 41.263 upp í 49.506.

Hjá báðum útbjóðarum er talan um vøkstur, men her er kanska vert at leggja til merkis, at Kall veksur heldur meiri enn Føroya Tele – tó at talan ikki er um tann stóra munin. Fyrra hálvár 2005 vór marknaðarpartarnir hjá Føroya Tele og Kall ávikavist 72,2% og 27,8%. Hesi tøl vóru í seinna hálvári 2006 broytt til 69,4% og 30,6%, altso ein lítil vøkstur til fyrimunar fyri Kall.

Áhugavert er eisini, at nógv velja at fáa sær talutíðarkort. Har er ofta talan um ung, og samlaða talið fyri talutíðarhald er pr. 31. Desember 2006 heili 27.255.

